# Lærari til Sumbiar skúla

Sumbiar skúli søkir eftir  lærara í tíðaravmarkað starv vegna barsilsfarloyvi, frá **3. januar til og við 21. juni 2024.**

Talan er um fulltíðarstarv.

Okkum tørvar ein lærara at undirvísa í náttúru & tøkni, støddfrøði, enskum, søgu og ítrótti/svimjing.

**Førleikakrøv**: Læraraprógv.

Onnur, sum ikki hava lokið lærarap rógv, eru tó vælkomin at søkja. Um eingin umsøkjari lýkur førleikakrøvini, kunnu skikkaði ófaklærd fólk verða sett.

**Lønar- og setanartreytir**

Lønar- og setanartreytir hjá lærarum eru sambært sáttmálanum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 - 29.2.

Starvið er sáttmálasett, uttan so, at tann, ið sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

**Barnaváttan verður kravd í samband við setanina.**

Tad verður væntað av umsøkjarum, at tey

- eru væl fyri fakliga
- eru røkin, nærløgd og stundislig
- eru fyrikomandi og hava ein positivan hugburð
- eru samvitskufull og álítandi
- duga væl at samstarva
- duga væl við børnum

**Umsóknir**

Umsóknir, saman við avriti av prógvi, skeiðum, CV og møguligum viðmælum, skulu vera Sumbiar skúla í hendi í seinasta lagi ónsdagin 27. nov 2023 kl 12:00, og skulu sendast til teldupost adressu: **sum@sumbiarskuli.fo**

Meir fæst at vita um starvið og um skúlan við at venda sær til Guðruna í Líðini á **tlf 37 06 66**.